# Løgmaður eigur at broyta skránna fyri ríkisfundin

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Heldur enn at dyrka ósemjur við stjórnina á ríkisfundinum mikumorgunin eigur landsstýrið at leggja upp til samstarv um mál av veruligum týdningi fyri Føroyar. ES-spurningurin og málið um at fáa fleiri føroyingar heim aftur til Føroya eiga at fáa rúm á ríkisfundinum**

Mikudagin er ríkisfundur á skránni. Hetta er árligi fundurin millum teir tríggjar ovastu leiðararnar í Ríkisfelagsskapinum, og hesaferð er Tórshavn fundarstaður.

Á skránni fyri fundin, ið Løgmansskrivstovan hevur almannakunngjørt, mangla tvey mál, ið hava stóran týdning fyri Føroyar: spurningurin um tættari tilknýti millum Føroyar og ES og málið um at fáa fleiri føroyingar at venda heim aftur til Føroya eftir útbúgving uttanlands.

**Tvey týðandi mál at samstarva um**

ES-spurningurin er undir sitandi landsstýrið tagdur burtur til fyrimuns fyri verkætlanina um at fáa limaskap í doyggjandi EFTA-limaskapinum. Danska stjórnin hevur góð sambond við starvsfelagar í Europasamveldinum og kann veita Føroyum hjálp at kanna møguleikarnar fyri tættari tilknýti til ES. Einasta, ið krevst, er, at landsstýrið setur fram ynski um hetta.

Hitt átrokandi málið fyri framtíð Føroya, og sum danska stjórnin eisini kann hjálpa við, er at fáa fleiri føroyingar at venda heim aftur til Føroya eftir lokna útbúgving. Framvegis útbúgva flestu føroyingar seg í Danmark, og tí er upplagt, at landsstýrið og stjórnin í felag kunnu taka stig til at venda skeivu gongdini.

Aftur her krevst, at landsstýrið er sinnað at samstarva innan Ríkisfelagsskapin, og at føroyskir myndugleikar seta fram ynski um samstarv.

**Lagt er upp til stríð**

Skráin fyri ríkisfundin mikumorgunin leggur tíverri ikki upp til samstarv, heldur tvørturímóti. Serliga tvey mál eru helst ætlað at seta eld í orðaskiftið frá føroyskari síðu: hvalaveiðumálið og málið um grønlendsku sjálvstýrislógina.

Í hvalaveiðumálinum fer løgmaður helst framvegis at mótmæla, at Fólkatingið tekur undir við einum uppskoti um eitt stórhvalareservat í Suðuratlantshavinum.

Hóast landsstýrið roynir at gera málið størri, enn tað í veruleikanum er, hevur løgmaður ivaleyst fingið til uppgávu at halda seg til konfronterandi linjuna, ið landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum stendur fyri.

Eftir ríkisfundin kann landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum so koma út at greiða fjølmiðlum og føroyingum annars frá, hvussu keðiligt støðan millum Føroyar og Danmark er.

Málið um hvalareservatið sunnast á jarðarhálvuni hevur avmarkaðan týdning fyri Føroyar, og tíðin fer helst at vísa, at føroysku áhugamálini verða fullvæl vard, hóast ein meiriluti í Fólkatinginum tekur undir við uppskotinum um reservat.

**Hvør broytti støðu?**

Áðrenn landsstýrið tekur revsaraleiklutin á seg og kritiserar stjórnina fyri broytingina í almennu donsku støðutakanini, er vert hjá landsstýrinum at minnast til, at stjórnin hevði øll síni tingfólk aftan fyri seg at stuðla almenna føroyska ynskinum um at vraka uppskotið um hvalareservat. Stjórnin er tó ein minnilutastjórn, sum ikki kann liva við at fáa ein meiriluta í Fólkatinginum ímóti sær. Tí má hon fylgja meirlitanum.

Hvør var tað so, ið broytti støðu? Jú vit kunnu staðfesta, at onkur grønlendskur fólkatingslimur hevur flutt seg. Kanska báðir. Og vit kunnu eisini staðfesta, at ávísir flokkar og tingmenn, ið Norðuratlantsbólkurin í Fólkatinginum plagar at samstarva við, taka undir við uppskotinum.

Undirritaði fólkatingsmaður royndi undan avgerandi fundinum í Keypmannahavn saman við fólkatingsmanninum hjá Tjóðveldi at ávirka bæði tingmenn og flokkar í andstøðuni í Fólkatinginum til at sleppa uppskotinum um hvalareservat og sostatt taka undir við føroyska sjónarmiðinum, men tað gav tíverri ikki úrslit.

So vítt, eg eri kunnaður, gjørdi landsstýrið onki fyri at ávirka nakran til nakað.

Undirritaði fólkatingsmaður hevur síðani staðfest, at ein nýggj parlamentarisk støða er í Fólkatinginum, og so má arbeiðast út frá tí veruleikanum.

Landsstýrið átti at gjørt tað sama og fingið sum best burturúr at samstarva við stjórnina. Hetta samstarv kundi hóskandi byrjað mikumorgunin.

**Berið tøkkina á rætta stað**

Ongin verður minni av at takka fyri hollan stuðul. Landsstýrið eigur tí at minnast til, at stjórnin í tí sanna ríkisfelagsskapsandanum hevur játtað Fiskirannsóknarstovuni 9,2 mió. kr. til gransking í havstreymum og sambandinum millum klimabroytingar og møguligar broytingar í havstreymum og lívinum í havinum kring Føroyar.

Undirritaði fólkatingsmaður fekk felags granskingarverkætlanina inn í stjórnargrundarlagið, og góðar 9 mió. kr. eru nógvir pengar. Fiskirannsóknarstovan hevur alment sagt, at henda gransking hevur ovurstóran týdning.

Tí eigur ein tøkk til stjórnina at falla á rætta stað mikumorgunin.

# Pensionistafelagið í Havn vitjar Suðuroy

FINNUR JOHANSEN



Pensionistafelagið í Havn var onsdagin 21. mai 2008 útferð til Suðuroyar. Vit vóru 37 í tali. Farið varð av Havnini við Smyrli klokkan hálvgum níggju fyrrapartin, og komið varð til Suðuroyar áðrenn klokkan var hálvgum ellivu. At siga frá ferðini suður er ikki tað sama nú siglt verður í minni enn tveir tímar, móti einum heilum degi, sum tað tók fyrr.

Á Krambatanga stóð bussur fyri okkum, og koyrdi okkum suður til Vágs. Mest spentir vóru luttakararnir at koyra gjøgnum nýggja tunnilin suður til Hovs. Ólíka var at fara tann vegin og at sleppa undan at fara upp um Hovsegg. Vit koyrdu framvið nýggja miðnámsdeplinum, ið verður bygdur sunnan fyri Hovsá úti í porkerishaganum, langt burtur frá fólki.

Á vegnum varð farið oman til Porkeris, og hóast tú væl kendi teg aftur, so var bygdin nógv broytt, síðani eg sum stórur smádrongur plagdi at ganga úr Vági og út til Porkeris at keypa mjólk, ofta meira enn eina ferð um vikuna. Nógv er broytt í tey 60-70 árini, ið gingin eru, Salurin í Skemmutúninum, sum var tað fyrsta tú rendi teg í, er fluttur niðan í bøin, men gomlu handilshúsini í Skemmununi, hjá Dijinum, skómakarunum og Samfylkinum standa í sama stað. Og ikki at gloyma kirkjuna og gamla skúlan, sum nú er bygdarsavn. Nógv nýggj hús eru bygd, men fleiri standa ikki í bygdini longur. Bæði húsini á Hövdanum, hjá Pola og hjá Josva eru fyri mongum árum síðani flutt til Vágs, húsini hjá Klyvari, ið stóðu oman fyri Skemmuna, eru burtur, og hugnaliga myndin av tí umhvörvinum, har Helenius gjördi des vestan fyri er ikki til.

Úr Porkeri koyrdu vit til Vágs, inn um Hövdan og gjögnum Klyvarnar, undir gomlu eplaveltuni vit hövdu undir krígnum og inn á Nes. Undir vegnum standa gomlu Sjóartoftir og Dunsatoftir, og oman fyri seinni húsini í Sjóartoftum, bóndahúsini og longri inni omanfyri gamla vegin hini húsini á Nesi, millum onnur tey við Neytalið og á Jaðri, og ikki at gloyma húsini hjá Morell. Oman av er lendingin á Nesi, beint innan fyri Stangarnestanga. Sunnanfyri fjörðin Agrar, Lopra, Beinisvörð og Kyrvið. Reyðabrekka er partur av gamla vegnum beint innan fyri Nes, og longri inni er Rættargjógvin og Neslíð, áðrenn vit koma til Vágs.

Farið varð beint vestur á Eiðið, sum Vágseiðið verður rópt har suðuri, eitt nú fyri at vísa vökru natúrina, og greiða luttakarunum týdninginum av útróðrinum haðani, sum stóð við til eftir seinna heimsbardaga. Av Eiðinum fóru vit út á Hotell Bakkan í Lágabö at eta dögurða, har stjórin Martin Christensen borðreiddi við aspargessúpan, oksasteik, desert og kaffi. Ein frálíkur dögurði. Hotell Bakkin skal hava stóra tökk fyri móttökuna.

Á ferðini vestur á Eiðið og út aftur koyrdu vit framvið gomlu húsunum, handlinum og pakkhúsunum á Gørðunum. Stórapakkhús niðri við Garðabrúgv, har millum annað mangur stampur varð gongdur, er ein perla í sær sjálvum. Gamli Garðahandilin og pakkhúsini kunnu ikki húsa modernaðari framleiðslu, men eru ideell til mentunarvisksemi, fyri ikki at tala um gamla skúlan frá 1884 á Oyralagnum. Á Fløðulið standa turkaríið hjá Diasi og timburhandilin.

Eftir vitjanina í Vági gekk leiðin norður eftir oynni, heilt norður til Sandvíkar. Á tann vælsignaður lætti tað er at sleppa frá at fara uppum Hovsegg. Spell er tað bara, at tunnilin kemur út í Tjaldavík heldur enn vestan fyri Øravík, men onkur helt, at teir vildu spara bøin hjá ørvingum.

Tú kannst ikki siga, at tað ikki er ein uppliving at koyra til Hvalbiara og Sandvíkar, men tað er sum at fara til bjarga, so tað er væl skiljandi at fólk gleða seg til teirra tørn verður at fáa nýggjar tunnlar. Annars rann mær í hug tær ferðir eg sum ungur var í Hvalba í grind.

Tað var formaðurin í Pensionistafelagnum í Havn, Suni Joensen, sum er ættaður úr Sandvík, ið skipaði suðuroyarferðina. Hann vísti okkum runt í bygdini, segði nakað um søguna hjá bygdini, og vísti á søguligu støðini, hvar Sigmundur kom á land, hvar Tórgrímur búði, umframt syndarligu hendingina av skaðagrindini á sinni. Eisini vísti hann okkum inn í barnaheim sítt, elstu húsini í bygdini, eini hálvtannaðhundrað ára gomul.

Úr Sandvík koyrdu vit suður á Tvøroyri, til gomlu handilshúsini og pakkhúsini hjá Thomsen, sum nú eru skipaði sum mentunarhøli. Vit fingu eina móttøka frá Onnu Kirstini, ið var brúdleypsgestum verdu, og hon vísti okkum eisini runt í gomlu húsunum, sum nýliga vóru gjørd í stand, áðrenn vit drukku kaffi inni í gamla handlinum. Ein imponerandi uppliving, sum bygdirnar og ikki minst Havnin kundu lært av.

Klokkan hálvgum sjey varð farið aftur til Havnar við Smyrli, og klokkan níggju um kvøldið vóru vit heima aftur hjá okkum sjálvum, væl nøgd eftir eina væleydnaði ferð, sum formaðurin, Suni Joensen, skipaði, og sum hann bæði skal hava takk og rós fyri.

## Det Norske Veritas 40 ár í Føroyum

SKIPASÝN
*Tíðindaskriv*

Í samband við, at tað í ár eru liðin 40 ár síðan Det Norske Veritas lat upp skrivstovu í Føroyum, verður skipað fyri áhugaverdum fyrilestrum í Norðurlandahúsinum hósdagin 21. august. Tiltakið er í høvuðsheitum ætlað sjóvinnuni, avvarðandi myndugleikum, og annars øllum, sum hava áhuga í einari burðardyggari framtíð og umhvørvi.

DNV Tórshavn er ivaleyst fyrst og fremst kent fyri klassing av skipum, men seinastu árini hevur verið arbeitt meir og meir við góðkenningum av ymiskum leiðsluskipanum innan m.a. góðsku, umhvørvi og trygd, harundir matvørutrygd. Harumframt verður veitt frálandavinnuni serkøn hjálp og góðkenning.

DNV Tórshavn er partur av DNV-samtakinum, sum er ein sjálvsognarstovnur við høvuðsskrivstovu í Noreg. Hjá samtakinun starvast meir enn 8.000 fólk í 100 londum. Høvuðsendamálið er at tryggja lív, virðir og umhvørvi á sjógvi og landi.

Tiltakið í Norðurlandahúsinum tann 21. august fevnir um tveir fyrilestrar og endar við einari móttøku. Fyrilestrahaldarar verða Henrik O. Madsen, ovasti leiðari í samtakinum og Thomas H. Tronstad, granskingarleiðari á deildini DNV Research and Innovation.

Henrik O. Madsen fer at umrøða skipavinnuna í hesum broytingartíðum og fer m.a. at koma inn á eina burðardygga framtíð, orkukeldur og CO2-útlát.

Thomas H. Tronstad fer at tosa um alternativar framdriftsloysnir í skipavinnuni og fer eisini at koma við dømum um aktuellar verkætlanir. Í hesum sambandi kann nevnast, at alt yvirskot í DNV-samtakinum fer til gransking og nýhugsan innan t.d. umhvørvi og eina burðardygga framtíð.

- Tiltakið í Norðurlandahúsinum er ókeypis, og øll áhugað eru vælkomin at tekna seg á torshavn@dnv.com ella á tlf. 35 37 50 innan 14. august, sigur Det Norske Veritas í tíðindaskrivi.